VINNU SÍÐURNAR

Nr. 64 • mikudagur • 6. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bakur og Stelkur høvdu roktúr á Bill Baily

**- Skipini fiskaðu í tveir dagar og fingu 340.000 pund av góðum upsa, sigur Ragnar Olsen, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Bakur og Stelkur høvdu roktúr um páskirnar. Teir fingu stívliga 340.000 pund í tveir dagar. – Hetta var góður upsi, sigur reiðarin, Ragnar Olsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Ragnar Olsen, reiðari hjá Beta, heldur, at upsafiskiskapurin seinastu dagarnar hevur verið heldur slakari, enn hann var, tá ið hann var bestur í vár.

- Vit plaga at siga, at besta tíðin er í februar og mars, og nú vit eru komin út í apríl mánaða, er líkt til, at tað tekur heldur longri tíð hjá skipunum at fáa túr.

Hann sigur, at Bakur og Stelkur á seinasta túri vóru úti tað mesta av eini viku, og tað hevur ikki verið vanligt hjá hesum báðum skipum, sum annars hava fiskað rættiliga væl, síðan tey komu í flotan.

### Roktúrur

Um páskirnar gjørdu nýggju skipini hjá Beta kortini ein av sínum bestu túrum.

- Teir vóru á Bill Baily og fingu uppí eftir tveimum døgum. Veiðan vá stívliga 340.000 pund, og hetta var góður upsi.

Ragnar sigur, at tað serliga var páskaaftan, at skipini høvdu síni bestu hál hendan túrin.

- Teir hava síðan verið úti aftur á Bill Baily, men nú hevur verið minni at fingið, sigur hann.

Reiðarin sigur, at Bakur og Stelkur koma innaftur at landa í dag, og hann væntar, at skipini eru full undir lúkurnar.

- Eg vænti eisini, at hini pørini hjá okkum koma innaftur at landa, tá ið hendan vikan fer at halla, sigur Ragnar Olsen.

## ChevronTexaco næststørst í heiminum

OLJUFELØG
*Jan Müller*

Amerikanska oljufelagið ChevronTexaco, so fekk tillutað leitiloyvi á føroyska landgrunninum í 2. útbjóðing, telist nú millum heimsins allarstørstu oljufeløg. Nú um dagarnar keypti felagið upp eitt annað stórt oljufelag, amerikanska UNOCAL fyri 18 milliardir dollars ella umleið 100 milliardir krónur. Við hesum keypinum flutti ChevronTexaco frá einum fimtaplássi til eitt annaðpláss av heimsins størstu oljufeløgum. Nú er bara ExonMobil størri. ChevronTexaco, sum er eitt av mest virknu feløgunum á Atlantsmótinum og nú eisini partur av leitingini við Føroyar, arbeiðir í løtuni framvegis við at finna ein pall at bora avmarkingarbrunnar við markið í summar. Komandi vikurnar fara at vísa um tað verður egg ella ungi. Sera torført er at fáa boripallar til hetta farvatnið í løtuni.

# Safir og Smaragd skulu hava kryvjimaskinu

**Tá ið hálini eru stór, sum tey mangan hava verið, nú so nógvur – og smáur – upsi hevur verið at fingið, standa menn og kryvja í nógvar, nógvar tímar. Hetta arbeiðið verður lættari, nú skipini fáa kryvjimaskinu**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Kryvjingin umborð á Safir og Smaragd fer at fella lættari, nú skipini fáa kryvjimaskinu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Týsdagin landaðu partrolararnir, Safir og Smaragd, hjá Beta í Saltangará. Teir høvdu eini 250 kør av fiski, sum viga eini 140.000 pund tilsamans.

Hetta er ikki nakar stórur túrur hjá skipunum, og líkt er til, at heldur minni upsi er at fáa í løtuni.

Men sum skilst, er vantandi fiskiskapur ikki einsamøll orsøkin til, at skipini ikki høvdu meira í lastini, nú tey komu inn at landa.

### Kryvjimaskinu

Sosialurin skilir, at reiðaríið, sum eigur skipini, hevur avgjørt at seta kryvjimaskinu í skipini, og tað er hetta arbeiðið, sum nú skal gerast, áðrenn farið verður útaftur.

Nógv hevur verið frammi um, at vaktirnar umborð á partrolarunum eru rættiliga langar, tá ið nógvur fiskur er at fáa, og hetta ætlar felagið, sum eigur Safir og Smaragd, nú at gera nakað við.

Eru hálini stór, sum tey mangan hava verið, nú so nógvur – og smáur – upsi hevur verið at fingið, standa menn og kryvja í nógvar, nógvar tímar.

Hetta gongur útyvir neyðugu hvíldina, og tí eru menn mangan útkoyrdir, tá ið túrurin er av.